# Tutl í Japan

Sølan av føroyskum útgávum úti í heimi er ikki avmarkað til Teit Lassen. Plátufelagið Tutl hevur í nógv ár havt eina støðuga sølu av útgávum í serhandlum kring knøttin. Garden Shed í Tokyo er nýggjasti handilin á listanum av handlum, ið selja Tutl tónar.

Kristian Blak dagligur leiðari á Tutli sigur við planet.fo, at í desember, januar og februar hevur felagið sent pakkar til Japan. Talan er um fløgur við Eivør, Klakki, Enekk, Piniartut, Týr, Kára Sverrisyni, Clickhaze, Yggdrasil og sjálvt gomlu fólkatónleikaútgávuni Gluggamynd hjá Glataðu spælimonnunum og Sjómansrímur hjá Hans Andrias Djurhuus.

Talan er um tilsamans út við 250 fløgur. Kristian Blak gleðist um áhugan í Japan og heldur at tað er stuttligt, at útgávur sum t..d tann hjá Glataðu Spælimonnunum, ið nógvir føroyingar verður sædd, sum serliga sterk orsakað av góða samanspælinum millum orð og løg, eisini fær góða móttøku í Japan.

**nud**

## Morrissey, Bob Dylan og Queens of The Stoneage á Roskilde Festivalinum

Í samrøðu við danska tónleikablaðið Gaffa í útgávuni, ið verður givin út 30. mars, avdúkar Legendariski tónasmiðurin og sangarin Morrissey, at hann spælir á Roskilde Festivalinum í ár, hetta skrivar heimasíðan gaffa.dk.

Men Morrissey gevst ikki so, men avdúkar somuleiðis at Bob Dylan og Queens Of The Stoneage verða millum hini høvuðsnøvnini á festivalinum. Morrissey hevur gjørt samrøðuna, í sambandi við, at hann gevur eina nýggja fløgu út í næstum. Gaffa.dk hevur roynt at fingið festivalin at vátta hesa søguna, men Roskilde Festivalurin vil hvørki vátta ella avvátta nakrar leysasøgur. Roskilde Festivalurin verður hildin um mánaðarskiftið juni/juli.

**nud**



Altíð tað nýggjasta

www.sosialurin.fo

Nú er tíð

at hugsa um summarfrí





Tíðin er komin at hugsa um summarfrítíðina.

Dømi: Vágar - Keypmannahavn og aftur 2.060,-*

Ferðaseðlarnir kunnu keypast á ferðaskrivstovunum ella atlantic.fo

Prísurin er galdandi á úrvaldum fráferðum. Tú skalt verða burtur náttina millum leygardag og sunnudag, tó í mesta lagi 30 dagar. Ferðaseðilin verður ikki endurrindaður. Les meira á heimasíðuni.

*Prísdømi: Vágar - Keypmannahavn fram og aftur 745,- + 745,- Ferðaavgjøld 520,- Avgreiðslugjald (internet) 50,-

ALPHA Tel 352 900 | Faroe Travel Tel 342 600 | FLOGFELAG FØROYA Tel 340 000 | FONN FLOG Tel 456 363

ATLANTIC AIRWAYS

www.atlantic.fo

# Sophisticated Ladies og Jazz Trio á konsertferð í Føroyum



*Sophisticated Ladies*

**Hetta vikuskiftið verða tríggjar spennandi jazzkonsertir við danska bólkinum Sophisticated Ladies og føroysku Jazz Trio**

### FO-DK JAZZ-KONSERTIR

Hóskvøldið kl. 19 spæla tey í Atlantis í Klaksvík, fríggjakvøldið kl. 21 í Býráðssalinum í Runavík og leygardagin kl. 16 í Norðurlandahúsinum. Hetta er fimta FO-DK Konsertferðin, sum Norðurlandahúsið skipar fyri saman við FUT og donsku tónleikafeløgunum DJBFA og Dansk Artistforbund.

### Sophisticated Ladies

Sophisticated Ladies hava spælt saman í 20 ár, bæði sum sjálvstøðugur bólkur og saman við eini ørgrynnu av mætum solistum, so sum Finn Ziegler, Richard Boone og Jesper Thilo. Tær hava í hesum sambandi verið á konsertferð bæði í Norðanlondum, Evropa og enntá eisini í Afrika. Bólkurin hevur øll hesi árini verið mannaður við Helle Marstrand (kontrabass), Benita Haastrup (trummur og slaginstrument) og Marie Louise Schmidt (piano). Við á Føroyaferðini verður eisini Christina Dahl (saksofon).

### Jazz Trio

Bólkurin Jazz Trio er mannaður við nøkrum av Føroya bestu tónleikarum. Á Atlantic Music Event í 2005 bleiv Arnold Ludvig kosin ársins bassleikari og Rógvi á Rógvu ársins trummuleikari. Harumframt hevur Leivur Thomsen í mong ár verið roknaður sum ein av føroya fremstu gittarleikarum. Teir hava allir tríggir røtur í jazztónleikinum, og fyri eini tíð síðani stovnaðu teir bólkin Jazz Trio. Teir spæla tó eisini við í øðrum tónleikabólkum og eru harafturat støðugt umbidnir sum gestatónleikarar hjá øðrum tónleikabólkum, bæði føroyskum og útlendskum.

Atlantis, Runavík og Norðurlandahúsið

Endamálið við FO-DK Konsertferðunum er at geva føroyskum og donskum tónleikabólkum møguleika at sleppa út at hava konsertir í londunum hjá hvørjum øðrum. Henda veturin hava konsertir verið hildnar í Føroyum, og komandi vetur verða líknandi konsertir hildnar í Danmark. Á konsertferðunum í Føroyum hevur dentur verið lagdur á at hildið konsertir ymsa staðni í Føroyum, og hesu ferð verður farið bæði til Mentanarhúsið Atlantis í Klaksvík, Býráðssalin í Runavík, umframt at jazzkafé verður hildin í Norðurlandahúsinum.

FO-DK Konsertferðirnar eru stuðlaðar av Atlantic Airways. Fleiri upplýsingar um konsertirnar kunnu fáast á www.nlh.fo



*Jazz Trio*